# Brennivínsroykurin setti seg í na


Hesir stóru tangarnir er eitt tað fyrsta, tú sært, tá ið tú vitjar Aalborg Akvavit

Mynd: Vilmund Jacobsen


Framleiðslustjórin á Aalborg Akvavit greiðir frá fyritøkuni

Mynd: Vilmund Jacobsen

**Seinasta fríggjadag var Sosialurin á vitjan á stóra bryggjarínum í Ålborg, Aalborg Akvavit, ið er kenda "kelinavnið" á fyritøkuni, sum nú er partur av ein stórari ketu, V&S Group**

VITJAN

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tær nýttist ikki at ivast í, hvagar tú var komin, tá ið tú steig inn um portrið hjá Aalborg Akvavit í Ålborg. Stóru tangarnir sóust langan veg, og í fremst túninum stóð bilur við nummarplátuni, AKVAVIT. Blaðstjórin á Norðlýsinum, Olivur Joensen, helt fyri, tá ið hann sá bilin, at hesin hevði ikki verið so væl egnaður at farið á morgunmøti við.

Hevði nakar sum helst ivi verið um, hvar tú var, var allur ivi burtur, tá ið tú komst innar í bygningarnar. Ramur roykur av brennivíni setti seg í næsarnar og hjá tí, sum ikki nýtist nógv meira enn uppí ein propp fyri at fáa eina kenning, mundi hesin roykurin næstan vera nóg mikið!

Eldur og sigarettir eru bannaðar á hesi vitjan, bæði inni og úti í garðinum, tí her snýr tað seg um sterkar og á mangar mátar "eldfimar" løgir. Spritt er eldfimt, og tí er ikki ráðiligt at taka sær nøkur óráð. Fartelefonir eru eisini bannlýstar á sprittverksmiðjuni, tí tær kunnu geva neistar frá sær – og so kann hin "versti" vera leysur…

Tað var áhugavert at fylgja framleiðslustjóranum á ferðini gjøgnum verksmiðjuna, har vit bæði sóu partar av tí gamla útbúnaðinum og tann nýggja.

Ikki minst áhugavert var at síggja gamla "sprittmátaran", sum Toll & Skatt í Danmark eigur. Á hesum mátara, har øll framleiðslan fór ígjøgnum fram til einaferð í sjeytiárunum, er teljari sum sigur, hvussu stór framleiðslan er – og hareftir vórðu avgjøldini roknað. Í dag rennur fínspritt framvegis gjøgnum teljaran, men nú er tað meira fyri at gleða tey vitjandi – og ikki sum partur av skyldunum mótvegis tí almenna.

Framleiðslustjórin segði, at størsti parturin av virkseminum á Aalborg Akvavit í dag er sjálvvirkandi, soleiðis at framleiðslutólini eru teldustýrd.

- Í sínari tíð vóru 350 fólk í arbeiði hjá fyritøkuni; í dag eru vit 40, men framleiðslan er 10 ferðir so stór, segði hann.

Á vitjanini fingu tey, sum